# *Kontrabókin*
# *Truck-skipanin í Føroyum 1856-1939*

*Jóan Pauli Joensen*

**Abstract**
This article gives an account of the passbook system – a variant of the truck system – operating in the Faroe Islands from 1856 – 1939, i.e. from the introduction of free trade until the Second World War. This war brought about big economic and political changes in the Faroe Islands. The aim of the article is to explain the background for the origin of the system and to explain the system. The hypothesis is that the passbook system in the Faroe Islands should be regarded as a transitional phenomenon in the development from a kind of moral economy to a more developed capitalistic society. It was a system which undoubtedly started from humane considerations, but in time became an economic fossil – an economic straightjacket – which under the added pressure of the economic depression in the 1930s brought about the ruin of both employer and employee.

## Inngangur
Í bókunum *Fiskafólk*, *Folk og Fisk* og *Fra bonde til Fisker* er m.a. skrivað um kontrabøkur og truck-skipanina (Joensen 1982; 1985; 1987), har nógvar heimildir eru endurgivnar bæði av manna munni og úr skjalatilfari, t.d. tær sera áhugaverdu ársfrágreiðingarnar frá amtslæknanum. Her skal hetta áhugaverda tilfar verða sett í eitt størri høpi. Kontrabókskipanin, sum fyrr var í Føroyum, er ein variantur av truck-skipanini, ið eisini er kend aðrastaðni. Mítt hugsanarstøði, ella mín hypotesa, er, at kontrabókskipanin eigur at skiljast sum ein skiftisskipan í einum tíðarbili, har føroyska samfelagið skiftir frá undirstøðubúskapi og moralskum búskapi (sí Thompson, 1983; Scott, 1976) til ein heldur meira framkomnan kapitalistiskan búskap og til eitt pengingasamfelag.

## Truck-skipanin í Norðuratlantshavi
Truck-skipan har løn varð latin í handilsvøru, kom í regluliga nýtslu millum arbeiðsgevarar í Onglandi fyrst í 19. øld. Sum løn ella part av løn fekk arbeiðsfólkið ein seðil við einum lønartali á, sum keypast kundi fyri í handlinum hjá arbeiðsgevaranum. Hóast hetta upprunaliga helst hevur verið meint væl, so kom úrslitið so við og við at verða tað, at prísurin á vørunum kom at verða væl hægri í hesum handlunum,

sum fólk vóru noydd at keypa úr, enn hjá øðrum handilsmonnum. Skipanin, sum hon var, gjørdi, at arbeiðsfólkið kom at verða bundið at arbeiðsgevaranum á hond og fót. Stig vóru tí tikin til at banna truck-skipanina við lóg (Riis-Hansen, 1915:18; Thomsen, 1970:51).

Karl Marx vísir m.a. á, at truck-skipanin, ið ofta er umrødd í *Das Kapital*, gjørdi sítt til at kúga arbeiðarastættin (Witt-Hansen, 1972). Hin vegin nýtist ikki truck-skipanin í ídnaðarlandinum Onglandi at hava verið av sama slag, sum tær kredittskipanir, ið vuksu fram í teimum peningaliga og fíggjarliga veiku útjaðaraunum í Norðuratlantshøvum, har handilskapitalisman á ymiskan hátt gjørdi seg galdandi t.d. í Íslandi, Føroyum, Norður-Noreg og í Ný Foundlandi. Eisini í Vesturjútlandi hava vit dømi um viðurskifti, ið ikki eru ólík hesum (Holm, 1992:42).

**Bygdakongar og stættarmunur**

Í flestu av hesum samfeløgum var tað handilsmaðurin ella keypmaðurin, sum hevði høvuðsleikin í tí búskaparliga lívinum í bygdasamfelagnum. *Nogen af dem slog sig stort op, andre virkede mere på det jevne, men alle rådede de i sin lille lokale verden*, sigur Knutsen um "nessekongene" í Norður-Noreg. Hin vegin veldst eisini um eyguni, ið síggja, og tað var júst *hans magt over omgivelserne som har gjort ham til en så omstridt figur, for hvad brugte han sin magt til? Nogle vil lægge vægt på hans rolle som konstruktiv kraft i distriktet, og på hans rolle som almuens hjælp i nødens stund. Andre vil fæste sig mere ved historierne om magtmisbrug og udbytning af bygdefolket* (Knutsen, 1988:13).

Ytreberg (1980:52) sigur frá Norður-Noreg, har tað longu í 16-1700 árunum var ein framkomin kredittskipan, at: *For fiskerbonden var det fristende å lite på at utrederen her nordpå alltid ville hjælpe når det knep. Det var annerledes med kjøpmannen i Bergen; han var langt borte, og det kostet ham ikke større overvinnelse å avskære kreditten i det øyeblikk det var nødvendig for hans forretning. Men handelsmannen nordpå hadde de stakkers menneskene boende omkring sig, tett innpå livet. De var hans medarbejdere i distriktets næringsliv, hans sambygdinger og sognebrødre, undertiden hans sognebarn. Hann møttes med dem i kirken, under ordets tukt og for Herrens alter. Det var ikke greitt å skulle se den i øynene som man hadde nektet det tørre brød. Da var det bedre å strekke sig så langt en maktet, av kristenpligt og medfølelse – selvom forstanden sa nei! Det var som Petter Dass sier: "Vi gad Deres Trang og ynkelig Jammer ei høre.*

Eisini í 19. øld vóru fiskimenn í Norður-Noreg bundnir at reiðarum og keypmonnum, sum vanliga vóru somu menn. Hesir fingu stórt vald og myndugleika – eisini tí teir ofta sjálvir vóru raskir bátsformenn og komu millum bygdafólki í øllum vanligum verki. Tað hoyrdi seg tí til, at teir settu mark fyri, hvussu nógv fiskimenn kundu keypa fyri, og noktaðu teimum at keypa tað, sum teir hildu vera marglætisvørur, tí kreditturin kundi koma fiskimonnunum og at enda eisini teimum sjálvum í óføri (Ytreberg, 1980:54).

Soleiðis kundi tað vera, har tað ikki var so langt millum keypmannin og fiskimann-

in, men tá einahandilin í Norður-Noreg varð avtikin í 1789, komu nógvir av teimum nýggju fríhandilsmonnunum at vinna nógvan pening og vórðu ríkir, *og med rigdommen fulgte overklasse-pretentionerne og afstanden til lokalbefolkningen. Barnene blev taget ud af skolen og udstyret med guvernanter og huslærere. Det skete at de fik kirken for sig selv når de skulle konfirmeres, med et ekslusivt publikum til stede. Siden blev de sendt på husmoderskoler i Sveits og til handelsakademier i Hamburg og kom hjem med lyse modeklæder og parasoller og sydnorske ægtefæller* (Knutsen, 1988:14).

Tað hendi sostatt ikki sørt av mentanarbroyting, sum gjørdi, at keypmennirnir og teirra fólk komu at skilja seg meira burturúr. Slíkt kundi eisini í ein ávísan mun koma fyri í Føroyum, har fríhandilin varð upphav til eina stætt, ið mentanarliga skilti seg burtur úr hinum fólkinum (Joensen, 1987:120). Hetta var kortini ikki øðrvísi í Føroyum enn so manga aðrastaðni í Norðurlondum, har stættarmunur eisini kom at merkja mentanarmunur (Frykmann og Löfgren, 1979).

Petur Háberg sigur í bókini *Hugbirtingar* (1981:124), at *fyri einum 50 árum síðani var eg inni har (hjá Frantz Restorff), eg haldi, tað mundi vera eina ólavsøku, tá komu tvær, ið líktust Dollarprinsessum úr fólkinum við diskin. Tær høvdu keypt sær hvør sína tíggjuoyrskøku -"kys" – og hildu tær so fínliga millum tummulin og fremstafingur, meðan lítli fingur peiðaði langt útfrá. Tá segði onnur heldur ilskliga: "Kalla okum fyri bygdafólk!" Eg skilti at hon var av Tvøroyri, og var aftan á hetta spentur at síggja henda stað.*

Tá sosialisman vann fram sum ein rørsla í Norður-Noreg, var stríðið millum keypmenn og fiskimenn sett í eina *teoretisk ramme, således at hele handelssystemet blev angrebet. Den politiske kamp blev derved gjort til en "Klassekamp" mellem fisker og handelsmand, som det hed* (Bratrein, 1988:111). Eisini her hendi ein broyting í sjálvsfatanini hjá einum samfelagsbólki. Eitt fyribrigdi, sum heldur ikki er heilt ókent í Føroyum (Joensen, 1982:189).

Teir granskarar, sum hava nýtt stættarhugtakið við at knýta tað at mentanargreining (culture analysis), og sum hava roynt at lýsa, hvussu ein stættur og fatanin av, at ein hoyrdi til ein stætt, er íkomin sum liður í eini mentanarligari gongd ella prosess, eru rættiliga áhugaverdar og hava, um tað ber til at siga tað so, velt nógv burtur úr nýggjum innan mentanargreining (s.t.d. Sider, 1986; Magnússon, 1990).

Í sjóvinnubygdum í Norðuratlantshavi er stættur ella klassi meira ein kvalitetsspurningur enn ein kvantitetsspurningur, og markini millum stættir eru vanliga kám og liðilig. Sosialu sambondini í einum lítlum samfelag eru ofta átøk teimum, sum vit finna í einum verði av spagetti, har alt er vavt saman (Joensen, 1989:19).

*Här om nogonstans finner vi diffusa och framför allt tjänbara klassgränser, vilket däremot inta alls är det samma som om klassmässiga relationer är icke eksisterande i området. Helt klart är att dessa är framvuxna ur de asymetriska relationer mellan fiskuppköpare och fiskarbefolkning. Det är med andra ord i detta fält inom produktionen som klasserfarenheterna och*

*klassrelationerne står att söka. Sen är det en annan sak att dessa klassmässiga faktorer får en modsägande effekt i det vardagliga livet. I de relativt väl avgränsede sociala miljöer som finns i Nordatlanten är det kretsade dagliga liv inte kring ett ständigt sökande efter fiender eller alliansbildninger. Den person som i en situation definerades som representant for det ojämlika produktionssystemet, kunde bli respektabel i en annan. Individer bedöms inte efter deras klasstillhörighet utan efter personliga egenskaper som arbejdskapacitet, arbejdsskicklighet eller integration i lokalsamhället,* sigur Finnur Magnússon (1991:103) við støði í sínum kanningum av íslendskum viðurskiftum. Hetta hóskar eisini væl saman við tí, sum føroysku heimildirnar boða frá. Nógv harðrendari er tann mynd sum Gerald Sider (1986) gevur okkum av viðurskiftunum í New Foundlandi, har keypmennirnir ikki fyrr enn roknskaparárið var komið at enda settu prís á tann fisk, sum teir høvdu keypt frá fiskimonnunum og á tær vørur, sum teir longu høvdu latið úr handlinum. Sider hevur eisini dømi um, at keypmennirnir har høvdu listar yvir tey fólk, sum skuldu sleppa at keypa upp á borg og yvir tey, sum einki var tillutað, og sum máttu hungra og, um illa vildi til, doyggja (Sider, 1986:60). Munurin á New Foundlandi og t.d. Føroyum var, at í New Foundlandi lá eingin gomul bónda- ella bygdamentan aftanfyri.

**Undirstøða og reiðupeningur**

Fyrr hoyrdi tað uppí undirstøðubúskap at gjalda við vøru og slíkum, sum ein hevði fyri neyðini, vanliga varð latið eitt sindur av peningi afturat. T.d. sigur Jóannes Patursson, at húskallalønin um 1870 var *16 dálar* um árið, umframt tilfar til klæðir, húðaskógvar og annað upp á kroppin. Eisini fingu teir seyð, og rætt til ávísan mat (Patursson, 1966:49). Kortini sýnist tað um 1832 at hava verið trupult hjá húskøllum og arbeiðskonum at fáa nakran reiðan pening. Bøndirnir vildu heldur lata teimum ríkiligari av mati og drekka. Í *Forordning af 21. Maj 1777 angaaende adskilligt Agerdyrkningen og Tieneste Folk med videre paa Færøe vedkommende* (Bærentsen, 1911:83 ff) – tann sokallaða trælalógin, stendur m.a. í grein 7, at umframt løn í mati og drekka skuldu: *Husbonderne herefter være pligtige at give Tieneste Folk den imellem dem accorderede Løn alleene i reede Penge, samt sædvanlige Klæder in natura.*

2. december 1832 skrivar amtmaðurin til Rasmus Müller sýslumann í Streymoy: *Herr Sysselmanden har i Skrivelse af 26. f. M. underrettet mig om, at De har bragt i Erfaring, at det skal være almindelig Skik, at Bønderne, tværtimod det udtrykkelige Forbud i Frdg. 21. Maj 1777 og 25 Marts 1791, udbetale deres Tjenestefolks Løn i adskillige Naturalpræstationer i Stedet for i rede Penge og de sædvanlige Klæder in natura, og derhos forespurgt, hvilke Tvangsmidler der for saadanne Overtrædelser bør anvendes.*

*I denne Anledning undlader jeg ikke herved at meddele Dem, at De ufortøvent bør indskærpe Almuen i Deres Syssel Efterlevelsen af de nævnte Anordninger, og derhos betyde den, at enhver Husbond og Tjener, som handler imod disse Paabud, derfor vil blive dragen til Ansvar og Straf,*

*saa snart man faar Kundskab om deres ulovlige Forhold.* Amtmaðurin mælir sýslimanninum til at síggja til, at lógin verður hildin, so at fólk fáa pening í løn, har tey hava rætt til tað. Orsøkin til henda áhuga hjá myndugleikinum fyri, at fólk fingu reiðupening um hendi, var, at tey skuldu hava okkurt at seta í tann nýstovnaða sparikassan, sum var ein tann fyrst spíraða nálin í tí komandi peningasamfelagnum (Davidsen, 1982:18).

## Føroyskur bygdabúskapur og handilsvørur

Í gamla føroyska bygdasamfelagnum var hvørt hús bæði ein nýtslueind og ein framleiðslueind, sum við serlig høvi varð víðkað til at fevna um stóran part av bygdini t.d. tá farið var í grind, í bjørgini ella á fjall. Serligar reglur vóru galdandi fyri býtið (Thorsteinsson, 1981; Joensen, 1980). Harumframt gjørdu fólk yvirhøvir gerabýti og hjálptu hvørjum øðrum. Hóast siðbundna undirstøðubúskapin hava Føroyar til allar tíðir eisini havt eitt ávíst samband við marknað uttan fyri Føroyar – antin gjøgnum einahandilin ella við loynihandilsskip, sum komu inn á firðirnar. Nakað av broyting kom í hesi viðurskifti við úthandlunum í Tvøroyri, Klaksvík og Vestmanna, men rættilig gongd kom kortini ikki á marknaðarbúskapin fyrr enn við fríhandlinum í 1856, sum broytti nógv í føroyska samfelagnum.

Fyrr var peningur mest nýttur til at goyma á kistubotninum sum ein ognarlutur, ella nýttur at keypa jørð fyri, hetta var tað gamla, tí dámdu bøndrunum heldur ikki at lata peningin fara í umfar. Ein keypmaður Weihe frá Selatræ gremur seg í Dimmalætting 14. februar 1891 um tað ólukku sum kreditturin hevur verið fyri føroyingar, sum nú brúka alt ov stóran part av inntøkum sínum til *dragter og levnedsmidler*, og sum í staðin fyri at fáa fiskin til høldar til sín sjálvs, halda at tað er *fornuftigere at levere alt til handelsmændene og få penge i stedet...* . Weihe dámar einki, at tað hevur verðið keypt ov nógv upp á borg, tí nú (í 1891) er tað vorið til eitt álvarsmál: *Hine tider, da krediten florerede, ere forstummede, tavshed og forsigtighed er nu den eneste udvej for at bevare eksistensen.* Hann heldur áfram: *at i denne tid, fra monopolhandelens ophør til nu, i alt fald for visse bygders vedkommende, vil den ubetænksomme kreditgiven løbe op til tusinder og atter tusinder af kroner, så at ved pludselig salg, om hele bygdens marketal inkl, kongsgods kom til auktion, alt dette ikke en gang blev tilstrækkeligt til at dække købmandens tilgodehavende.*

I Føringatíðindi fra 3. marts 1891 verður spurningurin tikin uppaftur, og tað er ein, sum gevur Weihe rætt, *men tað vísir seg, sum mangir handilsmenn vilja hava fólk at borga frá sær, tí so kunnu teir forða teimum at ganga ovmikið til aðrar handilsmenn. Í summum bygdum – soleiðis eystantil á Eysturoynni – fáa fólk ikki pengar frá handilsmonnunum, tá ið tey koma við fiski ella troyggjum, men alt verður skrivað. Tey fáa so út úr handlinum, hvat tey vilja, og tað verður eisini skrivað. Soleiðis kunnu ganga heili ár; fólk avreiða og borga, men vita ikki, um tey eiga nakað at keypa fyri. Hava tey nú avreitt fyri størri virði, enn tey hava keypt, fáa tey onkuntíð avlopið út, um tey*

*ikki vilja seta tað inn í handilin. Tað er tó sjáldan so væl, at tey eiga nakað; oftari hava tey í sínum ørviti tikið meira út úr handlinum, enn tey hava avreitt; so fáa tey onkuntíð at vita, at nú skylda tey so og so mikið. Handilsmaðurin verður kanska eitt sindur trekari enn fyrr at lata út, men annars kemur alt aftur í sama gamla myrkri.*

*Aðrir handilsmenn koma straks og leggja pengar á skivuna, tá ið tey hava avreitt, men so spyrja teir, um tey ikki skulu keypa, og skuldi ein maður nógvar dagar upp í slag borið allar pengarnar til hús, er óvist, um teir oftari høvdu verið lagdir á skivuna straks; men mestan altíð keypa mennirnir nakað – ella um maðurin býr í somu bygd, kemur konan aftur dagin eftir – og tá ið so nakað er keypt og handilsmaðurin hevur fingið pengarnar at bíta, sigur hann: "Nú er so ella so mikið eftir, skal tú einki keypa meir?" Maðurin kláar sær upp í vanga; hann hevði havt betur hug at borið hesar pengarnar til hús, men hann veit at handilsmaðurin dámar væl at fáa teir aftur í útdrag sítt (skuffu sína) antin fyri varir ella fyri gamla skuld, og so nevnir hann eitt og annað inntil pengarnir eru uppi. Kemur nú long uppiløga, veit maðurin, at hann fær hjálp frá handilsmanninum, um hann ikki hevur pening, og við tað at hann keypir so dugaliga, hevur handilsmaðurin tol at bíða og fáa pengarnar aftur so við og við, tá ið góðar innløgur koma. Ja, eigur maðurin eitt sindur av jørð, kann handilsmaðurin bíða enn longur og – í trongum tíðum taka við einum gyllini.*

Hetta orðaskiftið – seinast í 19. øld – er frá teirri tíðini, tá útróðurin var í hæddini, og sluppfiskiskapurin av álvara byrjaði at vaksa. Weihe ella hin, sum tók lut í orðaskiftinum, høvdu neyvan ímyndað sær ta broyting, ið nú kom, og sum økti ferðina móti peningasamfelagnum. Í 20 øld kom peningur so við og við at verða neyðugur hjá øllum, tí meira mátti keypast enn fyrr. Fríhandilin hevði givið fólkinum nýggjar møguleikar og nýggjan tørv. Nýggj krøv vórðu sett til einstaklingin, sum ikki var so vanur at hava pening um hendi. Tað var í hesi tíð, at menn settu jørð í veð fyri brennivín, sum var at fáa í flestu handlum. Tað var ikki óvanligt, at keypmaðurin skonkti ein fiskasnaps, tá menn komu av útróðri fyri at økja um keypshugin (Weihe, 1891; Jacobsen, 1994). Føroyingar høvdu, sum tað sýntist, enn ikki rættiliga vant seg við henda nýggja handilsmentalitetin.

### Fíggjarliga støðan um 1900

Vanlig handilskapitalisma setti dám á ta fyrstu tíðina eftir fríhandilin. Keypmenninir keyptu og seldu vørur. Tær íløgur, sum teir løgdu í framleiðslutól, vóru ikki stórar. Talan var um handilshús og pakkhús. Teir øktu so við og við um virksemið, ikki bert í Tórshavn og á Tvøroyri, men í mestsum øllum bygdum í landinum við úthandlum sínum. Handlarnir keyptu fisk, sum teir saltaðu og turkaðu. Teir, sum róðu út, áttu bátar, neyst og veiðiamboð.

So við og við fóru keypmennirnir at gera fleri íløgur í vinnutól, skjótt vóru tað teir, sum áttu flestu skipini. Hetta sæst í skipaskrásetingini á Føroya Landsskjalasavni. Í 1888 vóru 12 skip í Føroyum, í 1898 63, í 1908 142 og í 1935 165 fiskifør – sluppir og skonnartir. Sluppfiskiskapurin setti dám á alt samfelagið: skip á vánni um veturin og

fiskaturking um summarið. Tað kom røring í. Skipsmennirnir fóru um várið og komu aftur um heystið. Gentur og konur fóru at arbeiða í fiski, summar fóru sum fiskagentur til Suðuroyar. Broyttu sambondini førdu við sær nýggjar hugmyndir av ymiskum slag, men endin var ikki sleptur, tí um 40-50 ára aldur løgdust mannfólkini vanliga uppi og fóru at rógva út og takast við ymist heimaarbeiði, og tóku tá uppaftur gamla bygdalívið (Joensen, 1982:17ff).

Føroya Sparikassi varð stovnaður í 1832, sum fyrsti peningastovnur í landinum (Davidsen, 1982), men hann var, sum navnið sigur, ein sparikassi og hevði ikki bankavirksemi sum so. Eingin annar peningastovnur var tá. Tað vóru teir keypmenn, sum loystu hetta vandamál við sjálvir at taka eitt ávist bankavirksemi upp á seg. Teir góvu rentu upp á tann pening, sum fólk høvdu innistandandi hjá teimum. Dømi eru eisini, at fólk tóku pening úr sparikassanum og settu hann inn hjá keypmanninum, ið sostatt kom at kappast við sparikassan (Joensen, 1955:186). Tað vanliga hevur óivað verið, at keypmaðurin hevur givið viðskiftafólki sínum tilboð um rentur, um tey lótu løn ella avrokning verða standandi hjá honum. Richard B. Thomsen, ið sjálvur var væl inni í keypmannsviðurskiftunum á Tvøroyri, gevur okkum eina sera beinrakna lýsing av hesum, tá hann sigur, at: *Den monetære situation var naturligvis ikke ideel, efter som bankforbindelserne laa saa langt borte som i København. Til gengæld hørte kontante afviklinger ogsaa til sjældenhederne. Alt blev bogført indtil efteråret, naar kutterne blev lagt op og besætningerne afmønstrede – samtidig kom så de tunge guldforsendelser fra Danmark. Men hvad skulle sømanden slæbe dette guld med sig til? Grave det ned i jorden? Nej, han indskød sin fortjeneste i den handel, hvor han virkede og kunne opnaa 32% p.a. – Saaledes blev købmanden paa Færøerne ogsaa bankier, og de tusinder, som skippere, fiskere og arbejdere satte på rente i forretningen, gav ham et financielt rygstød, som ubetinget var medvirkende til gennemførelsen af den hurtige fiskeri- og forretningsmæssige ekspansion* (Thomsen, 1950:238).

Í 1906 kom Føroya Banki, meirilutan av partabrøvunum átti Den Danske Landmandsbank (Müller, 1981). Richard B. Thomsen sigur um hetta at: *Bankernes hovedformaal skulle naturligvis være det, at ophjælpe og støtte erhvervene, ikke mindst fiskeriet. Men i første omgang lød denne forjættede tale nærmest som absurditet. Banken splittede nemlig automatisk tillidsforholdet mellem købmanden og hans folk, der kom og forlangte deres penge for at sætte dem ind i banken. Disse udbetalinger forefaldt ofte på det mest ugunstige tidspunkt, hvor handlerne, sæsonmæssigt, var hårdt spændt for. Likviditeten kunne være på bristepunktet. Og derfor maate købmanden selv gaa i banken for at laane de samme penge tilbage igen, men paa andre vilkaar og med prioriteringerne hængende over hovedet* (Thomsen, 1950:238). Hin vegin kom ikki sørt av pengi í Føroyska samfelagið við Føroya Banka.

**Kredittur í einahandli og fríhandli**

Kredittskipanin var ikki nøkur uppfinning,

sum kom við fríhandlinum í 1856. Hon var eisini til í einahandilstíðini. Hvør húsbóndi hevði næstan óavmarkaðan kreditt í einahandlinum. Í 1802 verður sagt, at tað mestsum ikki var komið fyri, at nakar var stevndur eftir handilsskuld. Anton Degn (1929:11) lýsir einahandilin sum ein sosialan stovn, ið bygdi á moralskan búskap, sum førdi við sær, at ein maður, antin hann *var stræbsom eller efterladen, saa maatte Handelen dog tilsidst føde ham.* Tað vóru nógv viðurskifti, sum gjørdu, *at han fristedes til ikke at arbejde mere, end han dermed lige kunne skaffe det nødvendige til sig og sin Familie. Den faste Handelstakst, hvorefter han med matematisk nøjagtighed kunne beregne, hvor mange par Strømper eller lignende han behøvede at forarbejde til et Års Forbrug af Livsfornødenheder, gav ham ligeledes en anden Tryghedsfølelse, end hvis han skulle være nødt til at regne med Konjunktursvingninger.*

Hetta, sum Anton Degn sigur, samsvarar við tað, sum amtmaðurin Christian Pløyen (1840) sigur um viðurskiftini um 1830. Men hvørgin teirra hugsar um, hvussu stóran týdning sjálvbjargnisúrtøkan hevði fyri tað einstaka húsarhaldið, og hetta kom sjálvandi eisini til at ávirka tað, sum keypt var í handlinum, og soleiðis eisini at ávirka viðurskiftini hjá einahandlinum, tí *naar det var et godt Aar med Fiskeri og Avlen lykkedes, blev der solgt saa lidt, man havde da nok hjemme i Forraad, saa at Varebeholdningen (hos købmanden) laa og blev fordærvet; indtraf der Misvækst, Fiskeriet slog fejl og Faarene døde, manglede alle Levnedsmidler og vilde kjøbe; saa var det for lidt* (Andersen, 1895:34).

Hjá handlinum var tí neyðugt at hugsa seg væl um, hvussu nógv vøra skuldi takast heim til Føroyar. Varð meira tikið heim enn fólk keyptu, so førdi hetta til stóran miss, og varð ov lítið tikið heim, so førdi hetta klagur og rumbul við sær, tí fólk hildu, at tað var skyldan hjá handlinum at hava nóg mikið av teimum vørum sum tey høvdu fyri neyðini (Joensen, 1991:77). Einahandilin hevði eisini fastar prísir, sum fyri fyrstu ferð vóru ásettir í 1691. Hesir prísir vóru bert broyttir tvær ferðir í 18. øld – í 1723 og í 1790. Ikki fyrr enn í 1801 fór handilin at nýta skiftandi prísir (Degn, 1929:11). Fríhandilskeypmennirnir gingu sostatt gamlar gøtur við at lata fólk keypa upp á borg og nýta kontrabøkur. Tað var einki nýtt í hesum, men handil var nú í hvørjari bygd. Tað gjørdi munin.

**Allýsing av truck-hugtakinum**

Truck er definerað sum: *A set of closely related arrangements whereby some form of consumption is tied to the employment contract", and observed that this could encompass a range of formats from the payment of wages in goods, through compulsion to purchase at the employers store, to an agreement with "workmen who made irregular anticipations of wages accrued, but not do to be paid* (Hilton, 1960:1)

Spurningurin er, hvør hevði áhuga fyri at byrja og at varðveita truck-skipanina í einum samfelag? Rosemary Ommer (1989:112), ið vísir til (1877) um Hilton (1960:6) leggur áherðslu á tvey viðurskifti í sambandi við truck-skipanina í grein hennara *Truck System in Gaspé*:

1. *Truck was a monopsonistic device which used debt to tie a labourer to his employer by the consequent restriction of the mobility of the employee;* og

2. *Truck was an efficient means of operating under circumstances of coin shortage and/or poor credit facilities.*

Í fyrsta døminum er tað greitt, at talan er um eina miðvísa misnýtan ella eyðræning av arbeiðsmegi, har truck-skipanin hevur sum endamál at tryggja arbeiðsgevaranum støðuga og bíliga arbeiðsmegi. Í næsta døminum kann misnýtan sjálvandi koma fyri, men nýtist tað ikki, tí truck-skipanin var í hesum peningafátøku samfeløgum kanska einasti møguleikin, ið kundi nýtast fyri at knýta útjaðarasamfelagið at heimsmarknaðinum – við øðrum orðum einasti møguleiki at fíggja útflutningin. At læna pening frá arbeiðsfólki og sjómonnum var sostatt ein háttur at fáa fígging til menning og øking av vinnuni á staðnum. Í Føroyum hevði hetta í byrjan dám av "bankavirksemi", men tað varði kortini ikki leingi. Í meginreglunum var hetta ein sjálvboðin skipan, og í roynd og veru var eingin sáttmáli skrivaður um hetta millum partarnar, men kortini kom í ein framferðarháttur, ið førdi við sær, at fólk, um tey vildu tað ella ikki, keyptu sum mest í vøru fyri lønina í handlinum hjá arbeiðsgevaranum, sum mestsum altíð eisini hevði handil. Kredittskipanin kom so sníkjandi, uttan at fólk rættiliga gáaðu eftir tí, fyrr enn hon var grundarlagið undir øllum. Tað er ivasamt, um fólk yvirhøvur hava kent tað sum eitt ok ella band í byrjanini. Hetta kom ikki fyrr enn seinni, tá skipanin bant alt samfelagið niður, tí eingin annar útvegur var.

**Búskaparliga støðan og kredittskipanin**

Fleiri heimildarfólk siga, at tíðin til fyrra heimsbardaga var ein støðug tíð, tá tú kundi fáa pening útgoldnan í hondina, um tú ynskti tað, men so komu tær vánaligu tíðirnar um 1930, tá fiskaprísirnir fóru í botn. Í teimum góðu árunum aftan á fyrra heimsbardaga, vóru keypmennirnir yvirhøvur so mikið væl fyri, at teir kundu loyva sær at lata fólk standa í skuld til teirra í áravís. Teir høvdu stundir at bíða til onkur sonur kom til mans og slapp til skips, so at hann kundi hjálpa heiminum at gjalda skuldina. Í fleri førum hjálptu keypmenn fólki, ella gjørdu tað í hvussu so er ikki truplari fyri tey enn neyðugt. Hetta broyttist alt seinast í 20-árunum og triatiárunum, sum vóru stak vánaligar tíðir í Føroyum (Joensen, 1982: 465).

Í bók síni um Mortensensmennirar á Tvøroyri sigur Axel Mortensen (1988: 10ff), at handilin frá tí, at hann var gjørdur til partafelag í 1889 og til 1921, hevði vinning av virksemi sínum øll árini, uttan 1908 og 1909, tá hann hevði eitt hall uppá ávíkavist kr. 73.670 og kr. 25.258.

Av serligum áhuga er árið 1926. Hetta árið var virksemið umskipað í trý ymisk partafeløg, ið skuldu virka sum sjálvstøðugar eindir. Hvussu stór handilsskuldin er sæst ikki, men *harafturímóti sæst, at útistandandi peningur, tá býtið fer fram, er umleið kr. 600.000, og at henda upphæddin er nóg stór til at gjalda øllum ognarum við og eisini til stórt avlop* (Mortensen, 1988:13). Tað er ikki greitt, hvør hesin úti-

standandi peningurin hevur verið, men helst hevur ein stórur partur verið fyri vørur keyptar uppá borg ella kontrabók. Sakførarar vóru settir til at krevja inn henda útistandandi pening. Tað hevur helst eydnast, tí árið eftir hevði JME kr. 20.395 í vinningi.

## Gongdin hjá A/S J. Mortensen's Eftf. 1899-1936

| | Vinningur: | Tap: |
|---|---|---|
| 1899 | 137.203 | |
| 1906 | 122.512 | |
| 1915 | 212.345 | |
| 1918 | 508.822 | |
| 1919 | 594.214 | |
| 1921 | | 177.470 |
| 1922 | | 73.732 |
| 1923 | | 55.808 |
| 1924 | 177.470 | |
| 1925 | | 148.772 |
| 1926 | | 248.253* |
| 1927 | 20.395 | |
| 1928 | 88.376 | |
| 1929 | 34.275 | |
| 1930 | | 34.608 |
| 1931 | | 32.523 |
| 1932 | 3.222 | |
| 1933 | 7.968 | |
| 1934 | | 32.527 |
| 1935 | | 50.000** |

* Hetta árið var avgjørt at býta partafelagið í trý, soleiðis at A/S Hvidenæs og A/S Markøre komu at verða fyri seg.

** Hetta árið var eingin roknskapur. Talið er ein meting (Eftir Mortensen, 1988:11ff).

Hyggja vit at virkseminum hjá A/S J. Mortensens Eftf. so sæst, at við undantaki av onkrum árum hevur partafelagið givið vinning í eitt langt tíðarskeið, men í 1920-num taka trupulleikar seg upp av álvara, og har eru ár við stórum tapum. Undirskotið í 1925 og 1926 var stórt, men við at umskipa fyritøkuna varð gongdin vend til tað betra fyri partafelagið. Hetta styðjar eisini undir tað, sum heimildarfólk siga, at tað er í 1920-unum og 1930-unum, at kredittskipanin veruliga verður tyngjandi bæði fyri løntakarar og arbeiðsgevarar. Báðir partar vóru nú vorðnir fangar í fongsli kontrabóksskipaninnar.

Áðrenn hetta var tað at nokta fólki at keypa meira upp á borg ein hóttan, sum keypmennir kundu nýta móti viðskiftafólki sínum, um teir hildu tað vera neyðugt, men nú, tá tað veruliga var vandi fyri, at alt tað sum stóð úti, ikki fór at verða goldið, var kredittskipanin vorðin ein álvarsamur vandi fyri teir sjálvar og virksemi teirra.

Í 1924 vóru fiskaprísirnir sera vánaligir, og fleiri keypmenn vóru fyri stórum tapum. Keypmenn á Tvøroyri hildu tí, at tað var best at seta tímalønina niður frá 50 til 35 oyru fyri at fáa alt at hanga saman. Skotbráðið var bert tveir dagar. Arbeiðsmenninir kundu ikki góðtaka hetta og streikaðu tí. Spurningurin var so, hvussu tey 420 arbeiðsfólkini skuldu fáa mat í munnin, tí sbrt. lógum arbeiðsgevaranna á Tvøroyri (Nolsøe, 1986:100), samtyktar 10. juni 1918, stóð í grein 7, at *medlemmerne af Arbejdsgiverforeningen står solidarisk sammen. Ingen medlemmer af Arbejdsgiverforeningen må under en lock out yde den allerringeste kredit til de arbejdere, med hvilke man ligger i strid. Disse arbejdere må heller ikke tilstedes adgang til de til arbejdsgiverne tilhørende ro- og motorbåde.*

Endin var, at arbeiðsmannafalagið "Enigheden" sendi telegram til Havnar fyri

at fáa arbeiðsfólk í Havn at senda hjálp. Tað kom ein motorbátur við vøru fyri einar 1800 kr at halda hungrinum frá durunum. Keypmennirnir vóru kortini so mikið at sær komnir, at teir ikki settu óneyðuga hart móti hørðum, og alt endaði við, at tann verandi sáttmálin um tímalønina var galdandi (Nolsøe, 1986:100). Hetta er einasta funna dømi, sum sýnir, at tað at lata aftur fyri kredittinum kundi nýtast sum vápn í arbeiðsmarknaðartrætum.

Tað eru eisini dømi um menn, sum mistu nógvan "innlánspening" í 1920-unum, sum teir høvdu sett í handlar. Dømi er um menn, sum mistu bæði 30.000 og 70.000 kr.

**Útgangur**

Aðrastaðni (Joensen, 1982:452ff; 1985: 134ff) havi eg við fleri dømum úr innsavnaðum tilfari greitt frá, hvussu fólk upplivdu kontrabókskipanina. Bæði tá hon virkaði, og tá hon so við og við datt sundur. Eisini havi eg borið hetta tilfar saman við frágreiðingar amtslæknans, sum geva eina frálíka tíðarmynd, og har viðurskiftini í Føroyum eisini verða sett í samband við tað, sum hendi uttanfyri Føroyar, t.d. borgarakríggið í Spania. Hetta skal ikki verða endurtikið her.

Tað stutta av tí langa var, at kontrabókskipanin hevði yvirlivað seg sjálvan, tá vit komu til tríatiárini, hóast nýhugsan av ymiskum slag. Tvær handilsfyritøkur, S.P. Petersen, Fuglafirði og J. F. Kjølbro, Klaksvík, kom í 1930 og ávíkavist 1931 við metalmerkjumí at nýta í staðin fyri pening. Hesin "peningur" var í umfari í hálvfjórða ár, áðrenn hann var bannaður, og farið var aftur til kontrabøkurnar (Hansen, 1983:16). Arbeiðsmannafeløgini vóru frá byrjan ímóti hesum tiltaki (Jóansson, 1975:56). Royndir við slíkum "peningi" vóru eisini gjørdar í Íslandi (Magnusson, 1990:66f), so hetta var ikki serføroyskt fyribrigdi. Farið var so aftur til kontrabøkurnar, men nú vóru tað bert tey einstøku, sum fingu loyvi at keypa upp á borg: *Hjá Kjølbro vóru tað bert serliga álítandi fólk, sum fingu loyvi at hava kontrabøkur. Tann sum skyldaði, fekk ikki loyvi at hava kontrabók. Og so høvdu teir listar – svartalistar, tann sum stóð á svartalistanum fekk einki, tí hann skyldaði. Svartalistin hekk í hvørjum handli hjá Kjølbro. Nøvnini stóðu ikki á listanum, men tey, sum í handlinum vóru, vistu, hvør hesi fólkini vóru. Hini arbeiðsfólkini frættu hetta eisini* (Føroya Fornminnasavn, FSN. 728:19).

Truck-skipanin gjørdi sítt til at fíggja føroyska vinnulívið frá aldarskiftinum og frameftir, men hon kom eisini at binda fiskimann/arbeiðsfólk og keypmann/útgerðarmann alt ov fast saman. Skipanin bar eina tíð dám av at vera eitt trygdarnet hjá fiskimonnum, sum kundu keypa upp á borg, til avrokningin kom. Teir, sum hóast útistandandi skuld tey flestu árini fingu mest burtur úr hesi skipan, vóru kortini keypmenninir. At enda var hon eisini fleiri av teimum at bana. Kontrabókskipanin varð til eitt haft um beinini á øllum. Skipanin var runnin í stein, var vorðin til eitt búskaparligt fossil. Arbeiðsmannafeløgini kravdu lønina útgoldna í hondina, og eisini arbeiðsgevararnir og vinnulív ynsktu eina broyting í viðurskiftunum (Betænkning, 1939). Sjóvinnubankin varð stovnaður í 1932. Hesin bankin hevði føroyskan kapital

aftanfyri seg, ið vildi menna føroyska fiskivinnu og føroyskt vinnulív yvirhøvur (Arge, 1983). Í 1937 var "Føroya Fiskaeksport" stovnað. Ein menning var byrjað í tí smáa, men so kom 2. heimsbardagi, ið broytti alt. Nú var tað ísfiskurin, ið gav pening, so nógvan at umframt tað, sum varð útgoldið so hvørt, áttu føroyingar 2,8 mill. pund – ella uml. 60 mill. kr. til góðar í Stóra Bretlandi eftir kríggið, men tað er ein onnur søga.

## Bókmentir

Andersen, N. 1895. *Færøerne 1600-1709*. København.

Arge, J. og Arge, N.J 1983. *Bankabókin*. Tórshavn.

Betænkning 1939. *Betænkning angaaende Færøernes Erhvervsforhold afgivet af det af Statsministeriet under 12. April 1938 nedsatte udvalg*. Tórshavn.

Bratrein, H.D. 1988. "Nessekongene" i Nord-Troms 1870-1910. Í: Knutsen, N.M. (ed.). *Nessekongene. De storehandelsdynastiene i Nord-Norge*. Gyldendal Norsk Forlag. Oslo.

Bærentsen, C. 1911. Ældre Love og Bestemmelser om Landboforhold paa Færøerne. Í: *Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af Den Færøske Landbokommission nedsat i Henhold til Lov af 13. Marts 1908*. København.

Davidsen, J. 1982. *Føroya Sparikassi 1832-1982*. Tórshavn.

Degn, A. 1929. *Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne*. Tórshavn.

*Dimmalætting* 14. februar 1891. Tórshavn.

Frykman, J. og Löfgren, O. 1979. *Den kultiverade människan*. Lund.

*Føringatíðindi* 3. mars 1891. Tórshavn.

Háberg, P. 1981. *Hugbirtingar*. Tórshavn.

Hansen, J.S 1983. *P/F J. F. Kjølbro 1913-1983*. Klaksvík.

Hilton, G.W. 1960. *The Truck System including a History of British Truck Acts, 1465-1960*. Westport, Conn.

Holm, P. 1992. *Hjerting et maritimt samfund midt i verden ca. 1550-1930*. Udgivet af Hjerting Fiskeriforening ved hundredårsjubilæet 1892-1992. Esbjerg.

Jacobsen, E.S. 1994. *Rúsdrekka. Siðir og ósiðir*. Ikki prentað. Tórshavn.

Jóansson, T. 1975. *Saman tí standi. Fimti ára minningarrit Føroya Arbeiðarafelags*. Tórshavn.

Joensen, J.K. 1955. Peningaviðurskifti. Bankar og sparikassar. *Føroyar undir fríum handli í 100 ár*. Tórshavn.

Joensen, J.P. 1980. *Färöisk folkkultur. En översikt*. Liber, Lund.

Joensen, J.P. 1982. *Fiskafólk. Ein lýsing av føroyska húshaldinum í slupptíðini*. Tórshavn.

Joensen, J.P. 1985. *Folk og fisk. En studie over produktion og miljø i klipfiskeberedningen på Færøerne*. AalborgUniversitetsforlag, Ålborg.

Joensen, J.P. 1987. *Fra bonde til fisker. Studier i overgangen fra bondesamfund til fiskersamfund på Færøerne*. Tórshavn 1987.

Joensen, J.P. 1989. Socio-economic transformation and Faroese national identity. *North Atlantic Studies* 1(1): 14-20.

Joensen, J.P. 1991. Handel på Færøerne. En sej historie (Med kommentar af Peter Korsgaard). *Nordatlantiske foredrag. Seminar om nordatlantisk kulturforskning i Nordens Hus på Færøerne 27.-30. august 1990*: 74-85. Tórshavn.

Knutsen, N.M. (ed.). 1988. *Nessekongene. De store handelsdynastiene i Nord-Norge*. Gyldendal Norsk Forlag. Oslo.

Magnússon, F. 1990. *The Hidden Class. Culture and Class in a Maritime Setting: Iceland 1882-1942*. North Atlantic Monographs 1, Aarhus University Press. Aarhus.

Magnússon, F. 1991. Nordatlanten. Trender och aspekter kring ett forskningstema. *Nordatlantiske foredrag. Seminar om nordatlantisk kulturforskning i Nordens Hus på Færøerne 27.-30. august 1990*: 98-107. Tórshavn.

Mortensen, A. 1988. *Mortensen's mennirnir á Tvøroyri*. Tórshavn.

Müller, E. 1981. *Føroya Banki 1906-1981*. Tórshavn.

Nolsøe, J.P. 1986. *Arbejderklassen på Færøerne 1890-1940 – en analyse af dens tilblivelse og udvikling*. Speciale i historie. Københavns Universitet 1986. Ikki prentað.

Ommer, R.E. 1989. The Truck System in Gaspé, 1822-77. *Arcadiensis. Journal of the History of the Atlantic Region*. New Brunswick.

Patursson, J. 1966. *Tættir úr Kirkjubøer søgu*. Tórshavn.

Pløyen, C. 1840 (1966). *Erindringer fra en Rejse til Shetlandsøerne og Skotland i sommeren 1839*. 2. útgáva. Tórshavn.

Riis-Hansen, K. 1915. Arbejdsløn. Í: Blangstrup, C. (ed.). *Salmonsens Konversations Leksikon.* 2. Udgave. Bind 2. København.

Scott, J. 1976. *The Moral Economy of the Peasants: Subsistence and Rebellion in Souteast Asia.* New Haven. Yale University Press.

Sider, G.M. 1986. *Culture and Class in Anthropology and History, a Newfoundland Illustration.* Cambridge.

Thompson, E.P. 1983. *Herremakt og folkelig kultur.* Malmø.

Thomsen, R. 1950. Glimt fra færøsk frihandel i 100 år. Í: Djurhuus, H.A. (ed.). *Livet på Færøerne.* København.

Thomsen, R. 1970. *Historien. Gyldendals opslagsbog.* København.

Thorsteinsson, A. 1981. Jordforhold i det gamle bondesamfund. *Landinspektøren.* Særhæfte. Færøernes kartografi, udskiftning m.v. 30(10): 664-678. København.

Ytreberg, N.A. 1941 (1980). *Nordlandske Handelssteder. Virke, hverdag, rejseliv, fest.* F. Bruns Bokhandels Forlag. Trondheim.

Weihe, J.L. 1891. Færingen og kreditten. Í *Dimmalætting nr. 7, 14. 2. 1891.* Tórshavn.

Witt-Hansen, J. (ed.). 1972. *Kapitalen. Registerbindet.* København.

Jóan Pauli Joensen
Søgu- og samfelagsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya
FR-100 Tórshavn
Færøerne